# SLEPPA IKKI AT HÁTÍÐARHALDA FREDDIE MERCURY Í ZANZIBAR

Í sambandi við føðingardagin hjá Freddy Mercury í dag, var ætlanin at skipa fyri eini stórari strond veitslu í Zanzibar, har Freddie Mercury varð føddur. Men nú sær tað út til at fjepparnir ikki sleppa at hátíðarhalda dagin hjá deyða Queen sangaranum. Leiðarin av einum av størstu muslimsku felagsskapunum í Tanzania hevur heitt á myndugleikarnir um at forbjóða veitsluni, tí hon sambært honum er eitt fornemilsi móti muslimska fólkinum í Tanzania, hetta tí, at Freddie Mercury var samkyndur, sigur Reuters.

**nud**



Freddie Mercury var í Queen ein av heimsins best umtóktu sangarum og eitt veruligt ikon fyri samkynd.



Freddie Mercury varð føddur í Zanzibar meðan Tanzania enn var ein bretsk koloni

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Dreams | Sasa Sa, Sa |
| 2 | Marius | The Sky Is Our Home |
| 3 | 200 | Graceland |
| 4 | Rihanna | Unfaithful |
| 5 | Gestir | Hvørt Fótafet |
| 6 | Nelly Furtado | Maneater |
| 7 | BassHunter | Boten Anna |
| 8 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 9 | Muse | Knights Of Cydonia |
| 10 | Juanes | La Camisa Negra |
| 11 | Nik & Jay | Boing |
| 12 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 13 | Pink | Long Way To Happy |
| 14 | Robbie Williams | Rudebox |
| 15 | The Story Ends | Good Intuition |

### Eykaløg

| | |
|---|---|
| Vibekingz feat. Maliq | She´s Like |
| Cascada | Everytime We Touch |
| Teitur | Hitchiker |
| Korn | Politics |
| Eb/Streymur | E/B Streyma Sangurin |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Basshunter | Boten Anna |
| 2 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 3 | Red Hot Chili Peppers | Tell Me Baby |
| 4 | Nik & Jay | Boing |
| 5 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 6 | Rihanna | Unfaithful |
| 7 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 8 | Nelly Furtado | Maneater |
| 9 | Gnarls Barkley | Smiley Faces |
| 10 | Peter Sommer | 8-6-6-0 |
| 11 | Paris | Stars Are Blind |
| 12 | Kelly Clarkson | Break Away |
| 13 | Tina Dickow | Losing |
| 14 | Pussycat Dolls ft. Snoop Dogg | Buttons |
| 15 | Bob Sinclar ft. Steve Edwards | World, Hold On |
| 16 | Beyoncé ft. Jay Z | Déjà Vu |
| 17 | Michael Simpson | Jeg sidder fast |
| 18 | FO Yepha | Hængekøjen |
| 19 | Thomas Helmig | Aldrig sige aldrig mere |
| 20 | Razorlight | In The Morning |

### MTV European Top 20

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rihanna | Unfaithful |
| 2 | Nelly Furtado | Maneater |
| 3 | Madonna | Get Together |
| 4 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 5 | Pink | Who Knew |
| 6 | Pussycat Dolls | Buttons |
| 7 | Bob Sinclair | World Hold On |
| 8 | Paris Hilton | Stars Are Blind |
| 9 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 10 | Red Hot Chili Peppers | Tell Me Baby |
| 11 | T.I. | Why You Wanna |
| 12 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 13 | Keane | Is It Any Wonder |
| 13 | Rihanna | S.O.S. |
| 15 | Busta Rhymes | I Love My Chick |
| 16 | Fergie | London Bridge |
| 17 | Black Eyed Peas / Sergio Mendes | Mas Que Nada |
| 18 | Nelly Furtado | Promiscuous |
| 19 | Wyclef Jean / Shakira | Hips Don't Lie |
| 20 | Lordi | Hard Rock Hallelujah |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 2 | Fergie | London Bridge |
| 3 | Sean Paul Ft. Keyshia Cole | (When You Gonna) Give It Up To Me |
| 4 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 5 | The Pussycat Dolls Ft. Snoop Dogg | Buttons |
| 6 | Nelly Furtado Ft. Timbaland | Promiscuous |
| 7 | Cassie | Me & U |
| 8 | Danity Kane | Show Stopper |
| 9 | Ne-Yo | Sexy Love |
| 10 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 11 | Nickelback | Far Away |
| 12 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 13 | Ciara ft. Chamillionaire | Get Up |
| 14 | Young Dro Ft. T.I | Shoulder Lean |
| 15 | E-40 Featuring T-Pain & Kandi Girl | U And Dat |
| 16 | Chingy Ft. Tyrese | Pullin' Me Back |
| 17 | Cherish Ft. Sean Paul Of The YoungBloodZ | Do It To It |
| 18 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 19 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 20 | Yung Joc ft. Brandy Ms. B. | I Know You See It |

sound

# JUSTIN TIMBERLAKE FRIGGJAR Á KOMANDI FLØGUNI

Sambært ummælaranum hjá enska blaðnum The Sun, so biður Justin Timberlake unnustu sína Cameron Diaz um at gifta seg við sær á komandi fløguni hjá Timberlake. Ummælarin hevur fingið hendur á einum eintaki av Futuresex/Lovesounds. Í lagnum My Love syngur Timberlake m.a.:What's the point in waiting any more? Cos girl I've never been more sure, That baby it's you, This ring represents my heartm And everything you've been waiting for, Just say that I do. The Sun veit tó ikki hvat Cameron Diaz hevur svarað til friggjaríið. Ummælarin hevur annars bert rós til fjølbroytty fløguna, ið hevur bæði penar friðarligar balladur, diskotekshitt og gospelkend løg.

**nud**



Justin Timberlake vil giftast við Cameron Diaz sambært nýggju fløguni hjá honum

mynd: scanpix.dk

# KEVIN FEDERLINE FER TIL ARBEIÐIS



Nú vil Kevin Federline forsyrgja konuni og vaksandi barnaflokkinum.

mynd: scanpix.dk

Kevin Federline verður skjótt pápi at næsta barni sínum við Britney Spears, og tykist at vera vorðin troyttur av at vera heimagangandi saman við konu og barni, ella kanska vil hann bara fegin forsyrgja heimagangdi konu síni. Í øllum førum hevur tann fyrrverandi arbeiðsleysi rapparin skrivað sáttmála við Sony BMG um útgávu av fyrstu útgávu síni. Fløgan kemur út í oktober og sáttmálin við Sony BMG tekur nógv á bóli, tí rapparin er áður avvístur av flestu útgávufeløgum. Samstundis hevur Federline fingið tveir leiklutir í kendum sjónvarpsrøðum. Hann verður gestaleikari í CSI og Entourage.

**nud**

# GWYNETH PALTROW LEIKSTJÓRNAR COLDPLAY SJÓNBANDALAG

Gwyneth Paltrow fer í næstum at royna seg sum leikstjóra á einum sjónbandalagi, skrivar tv2.dk. Sjónleikarakvinnan royndi seg í fjør sum leikstjóri á einum stuttfilmi og er sera áhuga í at fáa royndir á hesum øki. Hon leitar tí eftir leikstjóra arbeiði, og nú sleppur hon at royna seg í tí heilt serligu filmgreinini, sjónbandaløg. Gwyneth Paltrow er gift við Coldplay sangaranum Chris Martin, og tað verður komandi Coldplay sjónbandalagið, ið Paltrow skal leikstjórna.

– Hon elskar tónleikin hjá bólkinum, so tað hjálpir sjálvandi. Eisini gevur hetta parinum meira tíð saman, sigur ein kelda, ið stendur parinum nær við tv2.dk.

**nud**



Gwyneth hevur nógvar royndir framman fyri filmmyndatólið, nú vil hon sleppa aftur um tað